| Gerðabók býráðsins | |
|---|---|
| Fundardagur: | 24. apríl 2008 |
| Býráðsfundur nr. | 04/2008 |
| Borgarstjóri | Sigurð S. Simonsen |
| Fundarskrivari | Jákup Frants Larsen |
| | |

Ár 2008 tann 24. apríl kl. 16.30 varð býráðsfundur hildin í býráðssalinum, hetta sambært skriv frá borgarstjóranum, dagfest 17. apríl 2008 um innkalling til fundar.

**Møtt vórðu:**
Sigurð S. Simonsen
Jann Toftegaard
Dánjal Vang
Elisabeth D. Eldevig
Eyðun á Lakjuni
Tórfríður Abrahamsen
Petur Abrahamsen
Súsanna Gaard
Jóhan Hansen

**Skrivari:** Jákup Frants Larsen, býráðsskrivari

Jón Nolsøe Olsen hevur við teleduposti til borgarstjóran, dagfestur 22. apríl 2008 boðað frá, at hann ikki kemur at møta á fundinum av persónligum ávum. Hann heitir á borgarstjóran um at kalla varlimin á lista B Súsonnu Gaard inn sína vegna. Borgarstjórin hevur tosað við varalimin um hesi viðurskifti, og møtti hon eftir áheitan borgarstjórans á fundinum..

Signar á Brúnni hevur telefoniskt tann 22. apríl 2008 vent sær til borgarstjóran við grundaðari fráboðan um, at honum berst frá at møta á fundinum. Hann heitir á borgarstjóran um at kalla varalim á lista E inn sína vegna. Av tí at 1. varalimur Jørmund Lambaa er burturstaddur, er 2. varalimurin á lista E Jóhan Hansen innkallaður og møttur.

**Mál nr. 20/2008.**

**Bygging av nýggjum dagstovni á Kambsdali.**

Sosiala nevndin hevur móttikið upprit frá bygginevndini fyri dagstovnin á Kambsdali, dagfest 03. apríl 2008 saman við tilmæli og uppskoti til møguliga fíggjan av bygging av nýggja dagstovninum, sum býráðið á fundi tann 11. desember 2006 hevur samtykt at lata byggja.

Bygginevndin hevur á fundi tann 03. apríl 2008 viðgjørt upprit og tilmæli frá Fuglø arkitektum, dagfest 03. apríl 2008, og mælir henda einmælt sosialu nevndini/ fíggjarnevndini/býráðnum til, at dagstovnurin verður bygdur og gjørdur liðugur sambært punkti 2 til ein samlaðan kostnað íroknað innbúgv, projektering og eftirlit upp á kr. 24.097.306,00.

Somuleiðis mælir nevndin til, at tíðarætlanin fyri byggingina verður hildin og annars strekt, soleiðis at stovnurin verður klárur at taka í nýtslu á vári 2010 móti sum ætlað tann 01. august 2009.

Sosiala nevndin hevur viðgjørt málið á fundi tann 04. apríl 2008, og mælir einmælt fíggjarnevndini/býráðnum til at taka undir við tilmælinum frá bygginevndini frá 03. apríl 2008, og at dagstovnurin verður gjørdur liðyugur sambært punkti 2 fyri ein samlaðan kostnað upp á kr. 24.097.306,00.

Tilmælið um fullfíggjaða liðuggerð av dagstovninum byggir annars á tann samleika, at verandi bíðilisti íroknað tey børn, sum flytast skulu frá dagrøktini yvir á dagstovnin er upp á 60 børn, somuleiðis sum mett verður at tey írestandi 18 barnaansingarplássini verða fult nýtt, tá ið nýggi dagstovnurin verður tikin í nýtslu á vári 2010.

Viðvíkjandi møguligari fígging av byggingini mælir nevndin til, at tikið verður undir við uppskotinum í álitinum frá bygginevndini, har kr. 2,0 eru nýttar í 2007 (staðfesting), kr. 2,0 mió. verða veittar í eykajáttan í 2008 og fluttar frá óbrúktari játtan í 2007, kr. 8,0 mió. eru við í játtan fyri 2008, kr. 8,0 mió. verða veittar í íløgujáttan fyri 2009, meðan íresstandi 4,1 mió. verður veitt sum íløgujáttan í 2010.

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt málið á fundi tann 04. apríl 2008 og tekur einmælt undir við tilmælunum frá bygginevndini og frá sosialu nevndini, dagfest ávikavist 03. og 04. apríl 2008, um bygging av dagstovninum sambært punkti 2 til ein samlaðan kostnað upp á kr. 24.097.306,00,

grundað á tann stóra ansingartørv, sum ídag er í kommununi, og sum eftir meting frá sosialu deildini framyvir eisini kemur at verða í kommununi.

Somuleiðis mælir fíggjarnevndin býráðnum til, at íløgufíggingin verður veitt sambært uppskotiunum frá nevndunum við kr. 2,0 mió. í 2007 (staðfestar útreiðslur), kr. 2,0 mió. í eykajáttan í 2008 flutt upphædd frá 2007, kr. 8,0 mió. í samtyktari íløgujáttan fyri 2008, eini íløgujáttan fyri 2009 upp á kr. 8,0 mió. og írestandi kr. 4,1 mió. í íløgujáttan fyri 2010, samantals kr. 24,1 mió.

**Avgerð:**
Samtykt varð at taka undir við tilmælunum frá sosialu nevndini og fíggjarnevndini um byggjan av dagstovni á Kambsdali fyri 24,1 mió kr. , og at hesin verður gjørdur heilt liðugur og verður klárur at taka í nýtslu á vári 2010. Játtanirnar verða veittar sambært tilmælinum frá fíggjarnevndini frá 04. apríl 2008 við kr. 2,0 mió. í 2007 (staðfestar), kr. 8,0 mió. í 2008 (avsettar á fíggjarætlanini), kr. 2,0 mió. í eykajáttan í 2008 fluttar frá óbrúktari játtar í 2007, kr. 8,0 mió. verða avsettar í 2009 og restupphæddin kr. 4,1 mió. verður avsett í 2010. (8 atkv. fyri 1 ímóti. Ímóti atkvøddi Tórfríður Abrahamsen).

## <u>Mál nr. 21/2008.</u>

***Viðvíkjandi eykajáttan (umflyting) "Skúlin íløgur – útbygging/viðlíkahald" til "Nýgerð skúlin framhald skúlapláss".***

Fíggjarnevndin hevur móttikið skriv frá Nevndini fyri uttanumøki skúlans, dagfest 03. mars 2008, har heitt verður á nevndina um at kunna brúka o.u. kr. 125.000,00 av játtanini til uttanumøki skúlans í fíggjarárinum 2008.

Peningurin skal verða nýttur til tilðugrerð av spæliplássinum oman fyri skúlan.

Sambært góðkendu fíggjarætlan kommununar fyri 2008 er eingin peningur avsettur á konto 445010 "Nýgerð framhald av spæliplássi", men eru kr. 1,0 mió. kr. avsettar á konto 445010 "Útbyggingar/projektering". Fyrisitingin metir í hesum føri, at talan er ikki um eina játtan, sum fíggjarnevndin sjálv kann taka støðu til, men at talan heldur er um eina eykajáttan í "Bólki 4" "Skúlin íløgur", sjálvt um talan er um umflyting av peningajáttan.

Fyrisitingin mælir til, um fíggjarnevndin tekur undir við at veita eykajáttan/umflyting, at fíggingin verður útvegað av konto 445010 "Útbygging og projektering av skúlanum", har kr. 1,0 mió eru avsettar og flutt til konto 445010 "Nýgerð framhald skúlapláss".

Sambært góðkendu fíggjarætlanini verður sama kontonummar nýtt bæði til "Útbygging/projektering" og "Nýgerð framhald skúlapláss" , so mett verður helst rættast, at seinna íløgukontoin fær nr. 445011.

Tá ið talan er um eina eykajáttan, so skal málið hava 2 viðgerðir í býráðnum við í minsta lagi 14 daga millumbili, hetta sambært § 41, stk. 2 í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mei 2000 um kommunustýri, og skal endaliga viðgerðin verða kunnað Innlendismálaráðnum í seinasta lagi 3 dagar aftan á samtyktina við 2. viðgerð, hetta sambært § 53, stk. 2,3 í somu lóg.

Málið hevur verið til viðgerðar á fundi í fíggjarnevndini tann 13. mars 2008, og mælir nevndin býráðnum til at veita eina eykajáttan upp á kr. 125.000,00 til omanfyri nevnda endamál, og at henda verður fíggjað av konto 445010 "Útbygging og projektering av skúlanum".

Nevnda eykajáttan ber ikki eykaútreiðslur við sær fyri kommunukassan, tá ið talan í hesum føri verður um eina umflyting av játtan undir øki 4 "Skúla- og mentamál".

1. viðgerð hevur verið á býráðsfundi tann 27. mars 2008 og varð samtykt at beina málið til 2. og endaliga viðgerð á komandi býráðsfundi tann 24. apríl 2008.

**Avgerð:**
Tilmælið frá fíggjarnevndini um eykajáttan (umflying) varð endaliga samtykt við 2. viðgerð. (9-0).

## <u>Mál nr. 22/2008.</u>

**<u>Mál viðvíkjandi uppskoti til fíggjarætlan fyri Fuglafjarðar bókasavn fyri ár 2009.</u>**

Víst verður til skriv frá Føroya Landsbókasavni, dagf. 26. november 2007 um innlatingarfreist fyri at lata inn fíggjarætlan fyri Fuglafjarðar bókasavn fyri rakstrarárið 2009.
Mentamálanevndin hevur móttikið uppskot frá kommunalu fyrisitingini, dagfest 07. apríl 2008 til fíggjarætlan fyri Fuglafjarðar bókasavn fyri **árið 2009**.

Sambært uppskotinum verða samlaðu rakstrarútreiðslurnar mettar til kr. 659.888,00 móti mettum kr., 665.736 í 2008. Inntøkurnar av rakstrarstudningi verða mettar til:

| | |
|---|---|
| Fuglafjarðar kommuna | kr. 395.932,80 |
| Landskassastudningur | kr. 263.955,20 |
| **Samantals** | **kr. 659.888,00** |

Sum tað sæst, so er lutfalsbýtið millum landskassa og kommunukassa í samsvar við nýggju bókasavnslógina……har býtið millum land og kommunu verður 60% í kommunurnar part og 40% í Landskassans part. Frammanundan var býtið 40% í kommunurnar part og 60% í landskassans part.

Kommunan hevur tó bert fingið kr. 184.000 fyri 2007 sjálvt um fíggjarætlanin fyri 2008 hevur eina rakstrarætlan upp á kr. 665.736, og roknskapurin fyri 2007 hevði eina rakstrarútreiðslu upp á kr. 613.086, sum skuldi givið Bókasavninum ein rakstrarstuðul upp á uml. kr. 251.000.

Tilsóknin um rakstrarstuðul frá Landsbókasavninum fyri 2007, dagf. 08. februar 2008 gevur somuleiðis Bókasavninum ein rakstrarstuðul upp á kr. 184.000, har 40% satsurin átti at givið Fuglafjarðar Bókasavni nakað tað sama sum árið fyri t.v.s. uml. kr. 250.000.
Soleiðis góðkennir Føroya Landsbókasavn, sum nú er, ikki eina fíggjarætlan fyri Fuglafjarðar Bókasavn, sum er størri enn kr. 460.000.
Um gongdin verður tann sama, so kann kommunan ikki rokna við einum rakstrarstuðli upp á kr. 263.955, sum henda fíggjarætlan leggur upp til.

Ætlanin hevur verið fyri á fundi í Mentamálanevndini 08. apríl 2008 og varð samtykt at taka undir við málinum og mæla býráðnum til at samtykkja uppskotið, ásannandi at rakstrarstuðulin ikki verður 40% av teimum kr. 659.888, men heldur 40% av kr. 460.000.

**Avgerð:**
Tilmælið frá mentamálanevndini varð samtykt. ( 9-0).

**Mál nr. 23/2008.**

**Umsókn frá Magna Mohr umbyggiloyvi til sethús á matr. nr. 211m.**

Fuglafjarðar kommuna hevur móttikið umsókn frá Magna Mohr, dagfest 25. februar 2008 um byggiloyvi til sethús á matr. nr. 211m í Fuglafirði sambært hjáløgdum tekningum.

Sambært umsóknini er fráleikin frá vestara enda á bilhúsinum til grundstykkið hjá grannanum Bjarna Beder 1,25m, men skal hesin sambært byggisamtyktini verða 2,5 m.

Umsóknin er tann 19. mars 2008 send Bjarna Beder til ummælis, og sambært skriv hansara til kommununa, dagfest 31. mars 2008, góðtekur hannhann hetta við munnligari avtalu millum hann og Magna um, at tá ið hann fer at byggja, so søkir hann eisini um at fáa syðsta/eystara av teirra húsum. Talan verður um eina altan, sum hevur eina frástøðu upp á 1,25 m. frá matr. nr. 211m.

Bjarni vil tí uttan aðrar viðmerkingar loyva Magna Mohr at byggja við eini frástøðuá 1,25 m. til grundstykkið.

Málið hevur verið til viðgerðar á fundi í teknisku nevndini tann 17. apríl 2008 og mælir nevndin býráðnum til, at umsóknin verður gingin á møti soleiðis at:

1. Treytirnar í almennu byggisamtyktini fyri Fuglafjørð og kunngerð um brunaverju frá 9. apríl 1992 verða fylgdar.
2. Í hesum sambandi verður víst á, at øll búrúm skulu hava minst eitt vindeyga, sum kann latast upp við fríum opi, sum er minst 50 cm í breidd og 60cm høgt. Hædd + breidd á tí fría opinum skal vera minst 1,50 m.
3. Parkeringpláss til 2 bilar skal verða inni á stykkinum, og hetta skal verða gjørt áðrenn flutt verður inn í húsini. Møguligt bilhús verður ikki roknað sum bilstøðil.
4. Ø 315 mm reinsibrunnur skal verða settur á báðar kloakkleiðingarnar áðrenn hesir verða veittir út av grundstykkinum.
5. Rottangi skal verða samb. leiðbeining frá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni og settur niður samb. vegleiðing um rottangauppseting. Eisini skal rundskriv dagf. 2. juli 1998 frá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni viðv. nýtslu av tilfari til dren verða fylgd.
6. Kloakkplanur skal góðkennast av teknisku deild og kloakkirnar skulu sýnast og góðkennast av Teknisku Deild, áðrenn tær verða tyrvdar.
7. Húsini skulu verða sett av teknisku deild.

Byggiloyvi er galdandi í 2 ár frá útskivingardegnum.

**Avgerð:**
Tilmæli frá teknisku nevndini varð samtykt. (9-0).

**<u>Mál nr. 24/2008.</u>**

**Umsókn frá SEV um byggiloyvi til transformatorstøð.**

Fuglafjarðar kommuna hevur móttikið umsókn frá SEV, dagfest 16. januar 2008 um byggiloyvi til transformatorstøð við Gjógvará, grundað á at ætlanin er at taka transformatortornið við Gjógvará burtur og byggja nýggja støð.

Umsóknin hevur verið til viðgerðar á fundi í teknisku nevndini tann 17. apríl 2008, og mælir nevndin býráðnum til, at umsóknin verður gingin á møti, soleiðis at takið verður undir veghædd, og at bygningurin verður 2,5 m. frá matr. nr. 666.

**Avgerð:**
Tilmælið frá teknisku nevndini varð samtykt. (9-0).

**<u>Mál nr. 25/2008.</u>**

**Broyting av byggisamtyktini fyri Fuglafjaðar kommunu.**

Í sambandi við ætlan um at leggja økið til sethús, har ætlaði vegurin til útstykkingina niðan fyri landsvegin úti á Land er, mælir tekniska nevndin býráðnum til á fundi 17. apríl 2008, at vegatkoman til økið omanfyri verður úr landsvegnum og uttan fyri Sýn, og at byggisamtyktin verður broytt samsvarandi hesum.

**Avgerð:**
Tilmælið frá teknisku nevndini varð samtykt. (9-0).

**<u>Mál nr. 26/2008.</u>**

**Mál viðvíkjandi stuðulspolitikki hjá Fuglafjarðar kommunu.**

Mentamálanevndin hevur í rúma tíð ynskt sær eitt amboð til viðgerð av teimum mongu umsóknunum, sum koma inn frá einstaklingum, bólkum og felagsskapum. Einasta stavnhald hjá nýggjum nevndum er møgulig siðvenja frá undanfarnum nevndum, og tað verður ikki mett nøktandi.

Á fundi í mentamálanevndini 11. mars 2008 viðgjørdi mentamálanevndin uppskot til stuðulspolitikk. Stuðulspolitikkurin hevur til endamáls at skipa arbeiðið við stuðli, soleiðis at tað verður lættari at umsita, samstundis sannlíkindi fyri at býta peningin skilagott og rættvíst gera størri.

Mentamálanevndin mæklir býráðnum til, at býráðið samtykkir stuðulspolitikkin uttan broytingar.

**Avgerð:**
Tilmælið frá mentamálanevndini varð samtykt. (9-0).

**<u>Mál nr. 27/2008.</u>**

**Viðvíkjandi matstovu- og skeinkiloyvi til Restaurant Muntra.**

Fuglafjarðar kommuna hevur móttikið telefax frá Politinum í Føroyum, dagfest 13. apríl 2008, har biðið verður um viðmæli frá kommununi til endurnýggjan av matstovu- og skeinkiloyvi til Restautant Muntra.

Heitt verður á kommununa um at avgreiða málið skjótast og senda møguligt viðmæli í seinasta lagi 14. apríl 2008 á miðdegi.

Kommunan hevur við skrivi, dagfestum 14. apríl 2008 boðað Politinum í Føroyum frá, at tá talan er um nýtt matstovu- og dansiloyvi ella endurnýggjan av fyrr givnum, so er málsviðgerðin av tílíkum máli tann, at umsóknin í hesum føri frá Poul Rustin um endurnýggjan av matstovu- og skeinkiloyvi á Restaurant Muntra skal verða løgd fyri býráðið til viðgerðar og støðutakan.

Orsaka av, at komandi býráðsfundur ikki verður hildin fyrr enn 24. apríl 2008, so hevur kommunan ongan sum helst møguleika fyri at koma við sínum viðmæli til Politiið í Føroyum, fyrr enn í fyrsta lagi mánadagin 28. apríl 2008, tá ið starvsfólk kommununar hava frídag flaggdagin 25. apríl 2008, sum er ein fríggjadagur.

**Avgerð:**
Samtykt varð uttan viðmerkingar at viðmæla yvir fyri Loyvisnevndini, at matstovu- og skeinkiloyvi verður veitt Poul Rustin á Restaurant Muntra komandi 5 árini. (8 atkv. fyri og 1 atkv. blonk. Blankt atkvøddi Sigurð S. Simonsen).

Bókin lisin. Fundurin lokin kl. 18.20.

Jann Toftegaard

Dánjal Vang

Elisabeth D. Eldevig

Eyðun á Lakjuni

Petur Abrahamsen

Tórfríður Abrahamsen

Súsanna Gaard

Jóhan Hansen

Sigurð S. Simonsen

Skrivari:

Jákup Frants Larsen